# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Fyribils er støðam, at stjórnin luttekur í OL-setanini, men endaliga avgerðin kemur ikki fyrr enn í summar*

*(Anders Fogh Rasmussen)*

# Ísbjarnirnar eta hvør aðra av svongd



**Broytingar í veðurlagnum hava stóra ávirkan á ísviðurskiftini norðan fyri Kanada og Alaska, og ísbjarnirnar har hava ilt við at fáa føði**

Ísbjarnirnar í Beauforthavinum norðan fyri Alaska og Kanada svølta í hesum døgum. Orsøkin er veðurlagsbroytingarnar, sum hava havt við sær, at ísurin er so tunnur, at bjarnirnar hava ilt við at veiða kóp, sum er teirra høvuðsføði hesa tíðina á árinum.

Heimsnáttúrugrunnurin WWF staðfestir í einari nýggjari frágreiðing, at broytingarnar í veðurlagnum hava størri ávirkan á tað arktiska økið, enn vísindin higartil hevur hildið. Frágreiðingin, sum er almannakunngjørd í dag, er grundað á kanningar og útrokningar, sum fleiri granskarar hava arbeitt við tey seinastu trý árini.

Um várið plagar kópurin í Beauforthavinum at gera sær tilhaldsstøð á ísinum, men nú er ísurin vorðin so tunnur, at kópurin fer aðrastaðni, og tað ger tað truplari hjá ísbjarnunum at fáa nóg mikið av føði. Kanadiskir granskarar hava sæð fleiri dømi um, at svangar ísbjarnir drepa aðrar ísbjarnir fyri at fáa føði.

Kanadisku granskararnir siga, at tað finnast eisini fleiri dømi um ísbjarnir, sum eru rýmdar úr tí arktiska økinum norðan fyri Kanada, og sum hava gingið fleiri hundrað kilometrar inn í landið at leita eftir føði.

*Ísbjarnirnar eru farnar at eta hvør aðra av svongd, siga kanadiskir granskarar (Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Menningartarnaður horvin

Bretska løgreglan leitar eftir einum menningartarnaðum drongi, sum eingin hevur borið eyga við síðani seinasta fríggjadag. Drongurin fór út saman við mammu síni, og í gjár fann løgreglan líkið av mammuni. Sambært Sky News bendir alt á, at hon hevði tikið lívið av sær. Løgreglan sigur, at drongurin, sum eitur James Hughes, er ikki mentur meiri enn eitt átjan mánaðir gamalt barn, og at hann tí ikki er førur fyri at lívbjarga sær. Hann situr eisini í koyristóli. Mamman átti tríggjar synir, sum eru yngri enn James, og kenningar hava sagt løgregluni, at hon var illa sperd av James, sum kravdi nógva umsorgan alla tíðina.

### Skal bjarga flogfelagi



*Silvio Berlusconi*

Komandi italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, ætlar sær at bjarga italska flogfelagnum Alitalia, sum hevur verið í fíggjarligum trupulleikum leingi. Ætlanin var, at felagið Air France-KLM skuldi keypa Alitalia, men nú hevur franska felagið boðað frá, at haðni kemur einki boð.

Silvio Berlusconi segði í gjár, at hann hevur fingið at vita, at eitt samtak av nøkrum feløgum arbeiðir við einum boði uppá Alitalia, og at boðið ætlandi verður klárt um einar fýra ella fimm vikur. Berlusconi legði tó afturat, at skal italska flogferlagnum verða lív lagað, má tað koyra fleiri starvsfólk til hús fyri at spara lønarútreiðslur. Sitandi stjórnin í Italia hevur júst játtað Alitalia góðar tvær milliardir krónur í láni.

## Blair gloymdi at gjalda

**Fyrrverandi bretski forsætisráðharrin Tony Blair fekk eina átalu mánadagin, tí tað vísti seg, at hann var farin við einum toki út í Heathrow floghavnina í London uttan at rinda ferðaseðilin. Blaðið Daily Mail skrivar, at Blair gjørdist sera illa við, tá eftirlitsmaðurin spurdi eftir ferðaseðli hansara. Blair noyddist at svara, at hann fekk ikki goldið, tí hann hevði ongar pengar uppi á sær. Ein av lívverjunum beyð sær til at rinda fyri Blair, men eftirlitsmaðurin lat hann fáa ferðina ókeypis, skrivar Daily Mail.**



*Tony Blair var farin við toki uttan at rinda fyri ferðina (Mynd: Reuters)*

# Flúgvandi presturin ikki at finna

**Brasilski presturin Adelir Antonio di Carli ætlaði sær at seta nýtt met sum ballónfari, men nú er hann horvin**

- Vælsignaðir, komið og bjargið mær. Sendið hjálp!

Tað eru tey seinastu orðini, sum nakar hevur hoyrt frá Adelir Antonio di Carli, síðani hann lætti sær á hangandi undir 1.000 heliumballónum. Mál hansara var at seta nýtt met fyri ferðum við tílíkum ballónum og at varpa ljós á eina ætlan um eitt tilhald til lastbilaførarar í havnini í býnum Paranagúa.

Men týsdagin sendi Adelir neyðarkall ígjøgnum fylgisveinatelefonina, og síðani hevur eingin hoyrt ella sæð hann. Týskvøldið fann brasilska sjóverjan fleiri ballónir fleiri fjórðingar úr landi, og løgreglan heldur tí, at vindurin hevur ført ballónirnar og prestin til havs, og at hann er dottin niður har.

Brasilska sjóverjan sigur, at Adelir Antonio di Carli var væl fyri líkamliga og harafturat væl útgjørdur, so tað er ikki óhugsandi, at hann kann halda sær á lívi í sjónum í fleiri dagar.



*Hendan myndin bleiv tikin, áðrenn tann brasilski presturin hvarv upp í luftina (Mynd: Polfoto)*